## Curbushley fer frá Charlton

Alan Curbishley hevur seinastu 15 árini staðið á odda fyri Charlton, sum við tíðini hevur bitið seg fast í ensku Premier League. Men nú stendur greitt, at væl lýddi venjarin ikki heldur fram á the Valley.
Tíðindini vórðu um vikuskiftið váttað av formanninum í Charlton, Richard Murray, og tað setir ferð á gitingarnar um, at Curbishley verður nýggjur enskur landsliðsvenjari. Tað er áður váttað, at Charlton-venjarin er ein av teimum, sum enska fótbóltssambandið hevur tosað við um sessin, sum verður tøkur, tá Svenn Göran Eriksson gevst eftir HM-kappingina í summar.

**-mørk**

## Firmakapping í Klaksvík

Komandi vikuskiftið verður skipað fyri firmakappingin í flogbólti í Klaksvík.
Tað er Mjølnir, sum stendur fyri tiltakinum, sum nú verður hildið triða árið á rað. Kappingin hevur hvørja ferð verið væl vitjað, og nú ókeypis tunnilssamband verður alla vikuna, roknað tey í Klaksvík við, at luttakararnir verða ikki færri í tali hesaferð, enn teir áður hava verið.
Reglurnar fyri luttøku eru, at tað skal vera ein kvinna á hvørjum liðnum, og at tað í mesta lagi skal vera ein spælari á liðnum, sum hevur spælt við meistaradeildini hjá monnum ella kvinnum seinasta ári.

**-mørk**

ÍF-VB/Sumba 1-2 (0-1):

# Púrasta sørir fuglfirðingar

*ÍF*

*VB/Sumba*

**Gestirnir vóru betri, grammari og effektivari, tá VB/Sumba kom á stigatalvuna. ÍF eru hinvegin framveigs púrasta sørir**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fótbóltsbarometrið er í botni í Fuglafirði fyri tíðina. Laku úrslitini, sum liðið hevur havt, tykjast hava tikið fótbóltshugin úr bygdini, og hetta speglast aftur í talinum av teimum, sum stuðla liðnum.

Í øllum førum var botndysturin móti VB ikki nakað, sum kundi toga serliga nógv fólk úr stovuni og á vøllin.



*Vágbingarnir vóru fyri tað nógva væl grammari, og tað var fult uppiborið, at teir fóru úr aftur Fuglafirði við øllum stigunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Gestirnir grammari

Og skal rætt vera rætt, so sýndi ÍF heldur ikki nakað spæl, sum soleiðis av sær sjálvum var lokkandi fyri áskoðaran. Fyri tað nógva gekk spælið sera óskipað niðan eftir vøllinum, og stinna VB-verjan við Evrard Ble og nýggja Christian Soelberg sum lyklaspælarum kom sjáldan undir nakað, sum líktist trýsti.

Vágbingar tóktust hinvegin vera væl betri fyri enn vertirnir. Hóast heldur ikki teir høvdu nakað stig undan dystinum, og sálarliga styrkin ikki var stórt øðrvísi, enn hon var tað hjá ÍF, so hómaðist alt fyri eitt ein ávís optimisma í teirra spæli. Hóast kantarnir kanska vóru meira miðvallarar enn áleyparar, so gav 4-3-3 skipanin møguleika at spæla breitt niðan móti ÍF-verjuni, og onkrar vandastøður spurdust eisini burtur úr stóra renniarbeiðinum, sum Dan Djurhuus og Henning Joensen framdu.

Tá leiðslumálið kom, var hetta tó heldur úrslit av ósketnum verjuspæli. ÍF verjan heilkiksaði, tá eitt hálvgum miseydnað fríspark varð sent móti brotsteiginum. Tað gav Birgiri Jørgensen møguleika at fáa hoppandi bóltin við inn í brotsteigin, og slíkan møguleika skal Birgir altso ikki hava ov nógvar av. Bólturin varð kanóneraður fram við málverjanum, og so varð mótbrekkan bara enn tyngri hjá ÍF.

### Perlu-uppspæl avgjørdi

Restina av dystinum gekk tað sum so bara eina leið. VB royndi fyri tað allar mesta at halda fast um verjupartin, fyri síðani at satsa við kontra-álopum, sum eisini í fleiri førum gjørdust vandamikil.

Fuglfirðingarnir skaptu hinvegin onkra staðni millum lítið og einki. Bartal Eliasen varð heilt skjótt flutur niðan í álopið, og so kundi altíð spælast við longum bóltum. Men samstundis gjørdi tað uppgávuni hjá verjuni rættiliga nógv meira einfalda, nú spælið so miðvíst varð lagt eftir einum og sama leisti.

Deyðsstoytin fekk ÍF, beint sum seinni hálvleikur var byrjaður. ÍF var annars á veg niðan í høgru, men tá VB fekk bóltin, gekk skjótt fyri seg. Henning og Jón spældu skjótt sínamillum, áðrenn Jón sendi framúr diagonalbólt til Dan Djurhuus, sum rann verjuna av, áðrenn hann sendi fram við Emil Toftegaard í málinum.

At ÍF eftir hetta kom meira við í spælið, mundi einamest vera, tí gestirnir nú tóku seg enn longur aftur á vøllin. Tað gav ÍF betri fortreytir at senda bóltar inn móti høvdinum á Bartali, men í alt ov nógvum førum førdi hetta ikki til meira enn fríspørk til vágbingarnar, tá Bartal nýtti kroppin dekan av nógv í luftdystunum.

Tað eydnaðist tó at minka um munin, tá Bartal stútaði hornaspark frá Atla Petersen í kassan, men í aðrar mátar komu teir ikki inn um Marcin Davids, sum í einum tveimum førum togaði heilt stórar bjargingar fram. Og í hinum endanum hevði VB eisini nakrar heilt stórar møguleikar, sum kundu punkterað fullkomuliga. Men spenningurin helt sær til at tað allarseinasta, og so kundu gestirnir fegnast um, at teir ikki longur eru niðasta liðið í deildini. Tann ivasama heiðurin lótu teir nú ÍF um.

## Hetta trongdi til

Liðformaðurin hjá VB/sumba, Dan Djurhuus, var sjálvandi ovurfegin, tá fyrstu stigini hjá liðnum komu til høldar sunnudagin.

– Hetta trongdu vit í øllum førum til. Vit hava jú havt eina sera trupla byrjan, og skuldu vit vinna framá, so var mest sum alt avgerandi, at vit vunnu í dag.

Tit tóktust eisini hava eitt gott tak fyri tað mesta. Kendu tit á tykkum, at hetta fór at verða dagurin?

– Vit stríddust í øllum førum væl, og vit hildu okkum til ætlanina. Móti endanum koma vit kanska undir nakað av trýsti, men vit halda so allan vegin heim, og tað var tað týdningarmesta. Nú ber betri til at hyggja frameftir til komandi uppgávurnar, staðfesti Dan Djurhuus.

**-mørk**

## Stigaleysir

Tað var einki lag á spælarunum hjá ÍF eftir dystin sunnudagin. Hóast tað enn eru 21 dystir eftir at spæla, sær verandi støðan á talvuni ikki sørt hættislig út. Við ongum stigi eftir seks dystum, og nú heima- og botndysturin móti VB/Sumba varð taptur, er bjargingin longur burturi, enn hon hevur verið áður.

Og heldur ikki hjá liðskiparanum, Høgna Zachariasen, var lagið nakað serligt.

– Vit selja okkum sjálvar alt fyri eitt. Teir fáa eitt bíligt mál, og so verður tað altso ræðuliga tungt hjá okkum at gera nakað.

*Tað tykist kortini, sum fáa tit eitt ávíst trýst móti endanum. Høvdu tit alla tíðina vónina um, at tað skuldi bera til?*

– Partvíst, men eg haldi ikki, at vit trúgva nokk upp á møguleikan. Teir duga eisini væl at halda fast og at fáa tíðina at arbeiða fyri seg.

**-mørk**